Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at

**Henny Andreasen**
**ættað úr Æðuvík**
**búsitandi í Hirtshals**

andaðist leygardagin, 71 ára gomul.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

---

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at góði maður, pápi og abbi okkara

**Hartvig Hansen**
**f. 17. nov. 1942**
**búsitandi í Høll**

andaðist í heiminum mánadagin 14. mars, 68 ára gamal.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

***Fyri tey avvarðandi***
**Bente, Diana, Petur Olaf og Anna Malena**

---

Kunngjørt verður, at

**Kaj Pauli Mortensen**
**ættaður úr Trongisvági**
**búsitandi í Tórshavn**

andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 14. mars, 62 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum hósdagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður frá Vesturkirkjuni fríggjadagin kl. 13.00.

***Familjunnar vegna***
**Sigrun, Jan, Heini og Julia**

Tey, sum vilja minnast Kaj, kunnu lata Havnar kirkju eina gávu, konta í peningastovnunum.

---

## Nøvn

# Viggo, bygdarmynd á Argjum, farin



*á Billutrøð á Argjum á grækarismessu 2011*

Viggo Olsen var føddur úti á Argjaboða á sumri 1935. Hann var sostatt 75 ár, nú hann legði árarnar inn og flutti yvir í aðra tilveru hendan várdagin, meðan tjøldrini aftur løgdu leiðina norðureftir.

Argjaprestur, sum eisini hevur verið smíðnæmingur hjá Viggo, dugdi sera væl at lýsa argjamannin, lokalpatriotin, handverkaran, málaran, yrkjaran og hugsveimaran Viggo, tá Viggo varð borin út úr kirkjuni á Høvdakúlu á seinastu ferð síni heim eftir Argjavegnum. Prestur nevndi t. d., at Viggo var ein persónur, sum tordi at vera øðrvísi enn fjøldin.

SKÚLAVØRÐURIN: Í Argja skúla á Billutrøð var Viggo smíðlærari og síðani skúlavørður í nógv ár. Mangt hugnaligt og hugsveimandi prát var á lærarastovuni og í skúlagarðinum, tá Viggo var hjástaddur. Onkuntíð varð undirritaði róptur inn í okkurt skot í Gamla skúla, tá Viggo hevði gjørt eina nýggja yrking um okkara felags heimbygd ella føðiland. Viggo las so yrkingina hátíðarliga upp fyri mær. Hesar løtur standa sum hugtakandi og ógloymandi varðar í huga mínum. Ikki mundi tað bila, at fríkorterini hjá næmingum mínum gjørdust einar 5 minuttir longri av hesum skaldaløtum!

Í skúlanum var Viggo eisini tann, ið dugdi at seta orð á yndi kvinnunnar, tá onkur av kvinnunum í skúlanum hevði fríðkað sær hárið ella var í nýggjum klædnaplaggi. Vit, hinir menninir í skúlanum, mundu vera heldur trekir á tí økinum.

YRKJARIN: Í yrkingasavni sínum, "Várśins morgun," sigur Viggo m.a. soleiðis um kvinnuna:

*"Eymleiki tín - sum skyggjandi sól á morgundøgg um várið."*

Várið var annars tema í fleiri yrkingum hjá Viggo:

*"Várśins sæla stund á grógvandi gøtum við sólglytum løtum."*

ARGJASANGURIN: Viggo hevur eisini yrkt argjasangin, "Tú liggur trygt—", sum so mangan hevur ljómað í Útvarpinum, tá reyðu argjabátarnir við drekastevni hava vunnið í kappróðri. Lagið hevur annars ein annar argjamaður, ein skyldmaður hjá Viggo, gjørt.

Viggo hevur eisini savnað staðanøvn fram við sjóvarmálanum á Argjum. Í yrkingum sínum nevnir hann ofta staðanøvn á argjaleiðum: Glyvursnes, Gulin, Prædikastólurin, Argjaskot, Rygsá, Tjaldursskér, Sandagerði, Ljósavatn, Klingurstjørn, Reynini o.s.fr.

MERKISMAÐUR: Viggo var merkismaður, bæði so og so. Í skúlanum var hann flaggvørður, og mangan hevur hann vundið Merkið á stong niðri á Billutrøð, bæði í sorgar- og fagnaðarløtum. Í grannalagi skúlans, heima hjá Viggo, hevur Merkið eisini mangan veittrað á tí sermerktu flaggstongini, sum har er.

MERKIÐ Á STIKLASTØÐUM: Viggo var ikki bert argjamaður, hvørs sjónarringur einans umfataði leiðina av Argjaboða heim í Sandagerði, nei, hann var eisini víðsjónamaður, heimsborgari, sum ferðaðist nógv uttanlands og hevði vinir í ymsum londum. Í týskari veitsluhøll hugtók hann fjøldina við føroyskari røðu. Okkara donsku vinir, sum vitjaðu Argja skúla á sinni, vóru hugtiknir av blíðskapinum, sum m.a. skúlavørðurin sýndi teimum.

Á Stiklastøðum í Noregi skipaði Viggo soleiðis fyri, at Merkið kom at veittra við síðuna av norska flagginum. Hann helt, at Merkið átti at veittra á norsku ólavsøkuni (Olsok), tí vit í Føroyum høvdu hildið ólavsvøku í næstan 1000 ár. Hetta fekk Viggo í lag saman við norskum vinum.

STARS AND STRIPES: Vit báðir Viggo hava ein felags vin vesturi í New Jersey, USA. Hann gav Viggo eina serstaka gávu: "Stars and Stripes." Tá varð Viggo fegin og rørdur. Eg fari at endurgeva orðini, sum okkara amerikanski vinur skrivaði um eitt minniligt kvøld við góðum mati, vit høvdu inni hjá Viggo og Sólveig: "I don't think that I ever experienced anything quite like that evening!" Helst óneyðugt at siga meir.

Góði Viggo! Hugaligt, at okkum untist at kenna teg. Spell, at heilsan ikki var tær til vildar hesi seinastu árini. Løgin kensla, at vit ongantíð aftur skulu síggja teg spáka heim eftir og út eftir Argjavegnum. Takk fyri manga góða og kveikjandi løtu!

Góða Sólveig, Sólbjartur, Eyðstein, Steinbjørn og familjan annars!

Harrin styrki tykkum í sorgini!

Vit enda við broti úr yrking hjá Viggo, har hann lítur fram móti ævinleikanum:

*"Fyri framman*
*tað æviga gonguverkið*
*í rúmdarinnar kervi*
*lívið eins og hvørvisjón fer."*

**Vegna okkum í Argja skúla og meg persónliga**
**Eyðun á Borg**